## Ferðslutrygd fær somu játtan

Fíggjarnevndin hjá løgtinginum mælir til, at Ráðið fyri Ferðslutrygd næsta ár fær somu almennu játtan, sum felagið hevði í 2004.

Uppskotið frá landsstýrinum var annars, at Ferðslutrygd skuldi skerast á sama hátt sum nógv onnur feløg, sum fáa almenna játtan.

Fyri Ferðslutrygd snúði hetta seg um 90.000 krónur, sum skuldi takast av teimum 900.000, sum felagið fekk seinast. Hetta svarar til generellu lækkingina á 10 prosent, sum landsstýrið tók undir við.

Fíggjarnevndin hjá løgtinginum hevur í sínum áliti skotið upp, at Ferðslutrygd aftur næsta ár fær 900.000 krónur. Eingin grundgeving verður givin fyri hesum, men sagt verður, at meirilutin í fíggjarnevndini vil hava somu játtan til Ferðslutrygd næsta ár sum í ár.

**ek**

## Taka fyrilit fyri brekaðum

Feløgini hjá teimum brekaðu skuldu næsta ár fáa minni almenna játtan, enn tey hava fingið í ár.

Landsstýrið vildi skerja øll feløg og stovnar eins nógv, og eingi fyrilit vóru tikin fyri ávísum feløgum. Hetta merkti, at eisini feløgini hjá teimum brekaðu skuldu skerast.

Hesum tekur fíggjarnevndin hjá løgtinginum ikki undir við, og í sínum áliti mælir nevndin til, at feløgini hjá teimum brekaðu fáa 480.000 krónur afturat teimum stívliga sjey milliónunum, sum vóru settar av á fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrium.

Eisini stuðulin til feløg hjá eldri skal hækka samanborið við uppskotið um fíggjarlóg. tey eldru fáa 25.000 krónur afturat teimum 225.00, sum stóðu í uppskotinum.

Í báðum førum verður sagt, at trivnaðarnevndin hjá løgtinginum heldur, at hesi feløg gera eitt munagott arbeiði, og tí verður mælt til, at tey fáa hægri játtan enn í fíggjarlógaruppskotinum. Meirilutin í fíggjarnevndini tekur eisini undir við hesum.

**ek**




*Tann nýggi heimurin við interneti, parabolsjónvarpi og øðrum ger tað vónleyst at hava veruligt eftirlit við filmum og telduspølum. Tí vil landsstýrismaðurin við mentamálum eisini hava ráðgeving og vegleiðing til foreldur og børn um hetta*

# Ráðgeving heldur enn bara eftirlit við porno og harðskapi

**– Tað er vónleyst at stýra og hava eftirlit við tí stóra floymi av telduspølum, videofilmum, parabolrásum og interneti, sum kemur inn yvir landið, men vit kunnu ikki geva upp fyri tað, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, sum nú fer at taka stig til eitt nýtt slag av eftirliti og ráðgeving**

EFTIRLIT
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin við mentamálum tekur nú stig til ein nýtt slag av eftirliti og ráðgeving í sambandi við filmar, telduspøl, internet og parabolsjónvarp.

– Tíðin er so nógv broytt, at vit mugu endurskoða okkara Filmseftirlit, og kanska skulu vit fara meira frá eftirliti og til ráðgeving og vegleiðing, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum.

Hann fer í fyrsta umfari at taka ein fund við nevndina í Filmseftirlitinum, fyri at taka hana við upp á ráð.

– Vit hava onga lidna loysn klára, men vit fara nú undir eitt arbeiði, har málið er at gera tað, sum vit kunnu gera fyri at verja serliga børn og ungdóm ímóti harðskapsfilmum, porno og øðrum.

### Innihaldið meira ógvusligt

Filmseftirlitið í Føroyum hevur meira enn einaferð hingið í einum klønum trái.

Onkur fyrrverandi landsstýrismaður við mentamálum mælti til at avtaka tað, tí tað var vónleyst at hava nakað veruligt eftirlit við filmum, sum tíðirnar eru blivnar við opnum interneti, parabolrásum og øðrum.

Fíggjarnevndin hjá løgtinginum hevur aftur í ár viðgjørt játtanina, sum stendur til Filmseftirlitið á fíggjarlógaruppskotinum. Tær 345.000 krónurnar verða tó standandi, eftir at fíggjarnevndin hevur tosað við landsstýrismannin um hesa játtan, og hann hevur boðað frá, at hann fer at arbeiða fyri at broyta Filmseftirlitið.

– Innihaldið í telduspølum, videofilmum, parabolrásum og interneti hevur fingið nógva umrøðu í eitt nú samstarvinum millum norðurlendsku mentamáláráðharrarnar. Semja er um, at stórur tørvur er á ráðgeving og vegleiðing til foreldur, børn, ung og til skúlan, tí innihaldið í hesum miðlum gerst alt meira harðligt og ógvusligt og harvið beinleiðis skaðiligt fyri børn og ung, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður.

### Ráðgeving heldur enn eftirlit

Jógvan á Lakjuni ætlar at varðveita lógina um filmseftirlit, men hann fer nú undir arbeiðið at broyta lógina.

– Tað er vónleyst at stýra og hava eftirlit við tí stóra floymi av telduspølum, videofilmum, parabolrásum og interneti, sum kemur inn yvir landið, men vit kunnu ikki geva upp fyri tað, sigur Jógvan á Lakjuni

Hann kundi hugsað sær, at lógin varð broytt soleiðis, at arbeiðið hjá Filmseftirlitinum ikki bara snúði seg um at hyggja eftir filmum og seta aldursmark á teir, men at talan eisini gjørdist um ráðgeving og vegleiðing fyri at minka um tey skaðiligu árinini av filmum og telduspølum.

– Nevndin í Filmseftirlitinum hevur nógvan kunnleika um hetta evni, og tí fari eg fyrst og fremst at tosa við tey um hetta. Hvussu vit skulu skipað eftirlitið frameftir, veit eg ikki, men tað skulu vit finna út av næstu tíðina, sigur landsstýrismaðurin.

– Vit skulu gera tað, sum vit kunnu fyri at hava eftirlit og fyri at ráðgeva og vegleiða um hetta, sigur hann.

# Prix Føroyar eisini á netinum

**Prix Føroyar hevur fingið nýggja heimasíðu, sum hevur til endamáls at føra føroyskan tónleik fram bæði heima og úti**

PRIX
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Sætta Prix Føroyar tónleikakappingin nærkast, og aftur hesaferð skal Prixið gera vart við seg á internetinum.

Nýggj heimasíða er gjørd, sum skal verða eitt forum fyri kappingini hesaferð.

– Dentur verður lagdur á at hyggja frameftir, at marknaðarføra føroyskan tónleik, at kjakast um tónleik og at leggja inn alt søguligt tilfar so við og við, sigur Fróði Vestergaard, sum samskipar kappingina fyri Norðurlandahúsið, Útvarpið og Sjónvarpið.

Á heimasíðuni fáa allir bólkarnir, sum skulu verða við í kappingini næsta ár, sítt pláss. Samrøður skulu gerast við tónleikarar, hentar upplýsingar skulu kunna finnast fram, og tónleikur skal eisini kunna hoyrast á síðuni.

Enn eru bólkarnir ikki lagdir út á heimasíðuna, og orsøkin til tað er sera einføld. Tilmeldingin til kappingina fer fram í hesum døgum, og frestin at tekna til er ikki úti fyrr enn 3. januar næsta ár. Tá verður tað greitt, hvørjir teir í mesta lagi 24 bólkarnir verða, sum skulu kappast hesaferð.

Bólkarnir fáa eisini møguleikan at brúka heimasíðuna hjá Prixnum við sínum egna tilfari.